

LIST

*Soleiðis ímyndar Sigrun Gunnarsdóttir (innsett) sær 1. ørindið í sálminum "Upp alt, ið Harrin hevur gjørt", sum ljóðar soleiðis: "Upp alt, ið Harrin hevur gjørt, hans dýrd og tign at prísa, hans minsta skaparverk er stórt og kann hans megi vísa"*

# 10 ørindi og 10 listaverk á Glyvrum



LOVSANGUR

*"Upp samfelt lov tú Drotni ber, tú heimsins mannaskari". Soleiðis byrjar 10. og seinasta ørindið í*

**LISTAFRAMSÝNING** **Víttfevnda listakvinna, Sigrun Gunnarsdóttir hevur nú tikið enn eitt stórt stig á listarleið síni: Hon hevur nevniliga gjørt eitt listarverk til hvørt einstakt ørindi í kenda sálminum "Upp alt, ið Harrin hevur gjørt"**

Snorri Brend

Sunnukvøldið verður Glyvra kirkja karmur um eitt serligt tiltak í hesum sambandi.

Tá letur Sigrun upp eina listaframsýning í kirkjuni, har hon sýnir fram listarøðina til áðurnevnda sálm, sum danska skaldið Brorson yrkti so langt sum í 1734.

Í sambandi við tiltakið fer listakvinnan sjálv at greiða frá síni myndlist, og sálmurin "Upp alt, ið Harrin hevur gjørt" verður sjálvandi eisini sungin.

Hetta er kortini ikki einasta framsýningin, sum Sigrun Gunnarsdóttir luttekur í beint nú. Hon er eisini við í framsýningini "Under Himmelhvælvingen" í Galleri Emmaus í danska býnum Ringsted.

Her er henda listarøðin eisini til sølu sum eitt samlað verk. Ummælið hon fær frá gallarí'num er ikki at forsmáa:

- Hon er munandi øðrvísi enn mangir av føroysku starvsfelagum hennara. Og hon er trupul at gloyma, tá ein fyrst hevur sæð verk hennara.

Framsýningin í Glyvra kirkju letur upp sunnukvøldið kl. 20, og verður kirkjan opin alla ta næstu vikuna.

Her verður høvið at njóta framsýningina, kvirruna í kirkjurúminum og at tendra ljós í ljóskolbuni í kirkjuni.

*snorri@sosialurin.fo*

# Bauckham vitjar sín føroyska næming

**GUDFRØÐI** **Richard Bauckham er kendur úti í heimi og háttvirdur sum bæði gud- og bíbliufrøðingur, og nú kemur hann til Føroyar at hava tveir fyrilestrar. Men vitjanin er fyrst og fremst fingin í lag, nú føroyski ph.d.-næmingur hansara, Poul Guttesen, gevur sína doktararitgerð út í bók mánakvøldið**

Snorri Brend

Richard Bauckham verður mettur ímillum fremstu gudfrøðingar í Bretlandi seinastu 20-30 árini. Hann varð føddur í London í 1946 og fekk ph.d-prógv í søgu frá Cambridge.

Í 15 ár undirvísti hann gudfrøði í universitetinum í Manchester, til hann í 1992 skifti skúla til universiteti í St. Andrews í Skotlandi. Í 2007 segði hann starvið frá sær og flutti til Cambridge, so hann fekk betri stundir at granska og skriva bøkur.

Akademiskt er Richard Bauckham breiður. Sum gudfrøðingur hevur hann viðgjørt læruna hjá Jürgen Moltmann, kristologi, eskatologi og hvussu gudfrøði hevur samband við náttúruvernd.

Sum bíbliufrøðingur hevur hann viðgjørt tríeindina, Opinberingina, Jákupsbrævið, 2. Pætursbræv, Judasarbrævið, jødiskan og kristnan apokalyptiskar skriftir, apokryfurnar, familjuna hjá Jesusi, frumkirkjuna í Jerusalem og hvussu Bíblian relaterar til nýmótans hugsan.

Millum hansara serliga kendu verk eru "Jesus and the Eyewitnesses", sum viðger evangeliini sum eygnavitnisfrásagnir. Hann yrkir eisini og hevur skrivað tvær barnabøkur.

### Ritgerð

Richard Bauckham kemur til Føroyar í samband við at føroyski p.hd.-næmingur hansara, Poul Guttesen, gevur sína doktararitger út í bók.

"Leaning Into the Future" eitur bókin, sum viðger gudfrøðina hjá Jürgen Moltmann við serligum atliti til Opinberingina.

Bókin verður løgd fram á serligari móttøku á Læraraskúlanum, har Richard Bauckham millum annað skal halda fyrilesturin, "Hevur skapanin eina framtíð?"

Hetta verður týsdagin 24. august, kl. 20 í veitsluhøllini á Føroya Læraraskúla. Møguleiki verður fyri at ogna sær bæði nýggju bókina hjá Poul Guttesen og bøkur hjá Richard Bauckham.

Dagin fyri móttøkuna, mánadagin 23. august, hevur Richard Bauckham ein fyrilestur í Miðlahúsinum undir heitinum "Trúgv, náttúra og margfalda lívið". Tað er Dialogos, sum skipar fyri.

Fyrilesturin er grundaður á nýggjastu bókina hjá Bauckham, sum eitur "The Bible and Ecology". Bókin verður til keyps á staðnum. Hetta verður mánadagin 23. august kl. 20.

*snorri@sosialurin.fo*



UNDIRVÍSING

*Richard Bauckham hevur skrivað nógvar bøkur og hevur undirvíst á mongum støðum. Nú fáa føroyingar høvið at hoyra hann*

## Framløga av ritgerðini

Sum longu nevnt verður almenna framløgan av ritgerðini hjá Poul Guttesen komandi týsdag. Her verður gjørt nógv burturúr í víttfevndari skrá, sum sær soleiðis út:

| | |
|---|---|
| 20:00 | Vælkoma – Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum |
| 20:05 | Tónleikur – Lena Andersen |
| 20:10 | Stutt um Ph.D. verkætlanina "Leaning into the Future" – Poul F. Guttesen |
| 20:20 | Fyrilestur "Hevur skapanin eina framtíð?" ("God's Future for the Whole Creation") – Richard Bauckham |
| 21:05 | Ummæli av Leaning into the Future – Rólant í Skorini |
| 21:10 | Um Granskingarráð Føroya – Annika Sølvará |
| 21:15 | Tónleikur – Lena Anderssen |
| 21:20 | Kaffi og køkur – møguleiki verður at keypa bøkur eftir R. Bauckham og Leaning into the Future eftir P. Guttesen. |